# Hugskot um áir sum renna undir heilum

*Eftir Jóannes Rasmussen.*

Orðafelli »at renna undir heilum« ella »áin rennur undir heilum« er sera vanlig føroysk málbering sum sipar til tað fyribrigdi at ein lítil á ikki rennur opin, men er so væl fjald undir jørð, at valla ella als einki sæst til hennara. Í Sandoynni og í Skúvoy verður orðið løkur, sum annars hevur somu merking sum ein lítil á, nýtt um hetta sama fyribrigdi.

Á, sum rennur undir heilum, rennur ikki alla leið sína undir heilum, men longri ella styttri strekki. Har brattari er rennur hon vanliga opin og har slættari er ofta undir heilum. Stundum er svørðurin oman á skrædnaður so opi er niður á ánna og ofta hoyrir tú á sum rennur undir heilum har tú gongur hóast tú einki sært til hennara.

Spyrt tú fólk um hvørjar tankar tey hava gjørt sær um hesar áir sum náttúrufyribrigdi, hvør uppruni teirra man vera — hví tær renna undir heilum — fært tú rættuliga ymis svar. Mong hava als ongar tankar gjørt sær um tað; summi halda at áin sjálv hevur leitað sær ræsur niðurundir har framkomuligast var meðan tey flestu vilja vera við at áin hevur matað seg niður í lendið og at svørðurin so seinri er vaksin saman um aftur í erva so at áin sum fyrr rann opin nú rennur undir heilum.

Tað skal ikki vera dult, at høvundurin at hesum greinastubba sjálvur fyrr hevur verið teirra millum sum ongar náttúrusøguligar tankar gjørdu sær um hesar løkir, tí teir í huga hansara, eins og teirra, meira kendist sum eitt náttúruromantisk enn sum eitt náttúrusøguligt fyribrigdi.



1. mynd. *Lendið omanfyri vegin í Hjarðardali.*

Eygleiðingar av gjøgnumskurðum gjøgnum tílíkar áir har vegagerð er farin fram hesu seinastu árini hava kortini av tilvild bent hugsan høvundsins inn á spurningin um uppruna teirra og aldur. Havt má tó verða í huga tá hesin spurningur verður drigin fram, at eygleiðingar av hesum slag ofta kunna vera torførar og svikaligar tí lendið har hesar áir koma fyri ikki er órørt, men órógvað gjøgnum øldir av torvskurði og hagarøkt so ilt er at fáa greiðu á hvat er upprunaligt og hvat er ávirkað av mannahond.

Úrslitið sum høvundurin við eygleiðingum sínum er komin til er í stuttum, at áir sum renna undir heilum ikki sum hildið hevur verið hava matað seg niður gjøgnum svørð og mógv,



2. mynd. *Áin har hon kemur úr bakkanum við vegin í Hjarðardali.*

niður á fast, og svørðurin seinri grógvin saman um aftur í erva so tær nú renna undir heilum, men at upprunin til legu teirra, í hvussu so er í mongum førum, er eldri enn mógvur og svørður oman á, við øðrum orðum, at byrjanin til áarleguna gongur aftur til tíðina millum seinastu glersetingina og móðgerina (seinglacial-preboreal tíð).

Tað lendið sum kom undan tá ísurin bráðnaði var berligt á at líta: nakin ísbrýndur klettur, skurvutir leirheyggjar, skriður og eyrskruv. Avfallsvatnið úr fjøllum og hálendi leitaði tá saman í løkir sum gjørdu sær ræsur oman eftir har minsta mótstøðan var. Í líðum og láglendi funnu óteljandi smáløkir saman



3. mynd. *Nærmynd av áarmunnanum, sum sæst á 2. mynd. Tummastokkurin stendur á markinum millum mógv og mórenu.*

í áir sum í dølunum sameindust til eina stóra meginá ið streymaði út á sjógv.

Áir sum renna undir heilum koma oftast fyri í undirhaganum. Niður úr homrunum og annars har brattari er rennur áin við ferð, máar djúpt og heldur seg til áarleguna, hon rennur opin. Har slættari er leitaði hon ymsar vegir og fløddi stundum út yvir lendið. Á hesum blotum gjørdist so við og við mógvur sum vaks til tjúkdar og sum frá leið fjaldi vatnræsini sum undir vóru. Tey komu tá at renna innibyrgd, tikið kundi verðið til »sum í einum røri«. Tá avfallið var meira og vatnføringin størri kom tí trýst á og áin ella vatnræsini máaðu seg ikki bara niður í leguna, men so við og við eisini upp í mógvin oman á, í støðum so langt upp at svørðurin gav seg undan og skrædnaði.

Til at lýsa hetta fyribrigdi gjøllari skal sum dømi verða víst á nakrar myndir tiknar við vegin í Hjarðardali omanfyri ovasta bugin í vegnum oman til Oyndarfjarðar.

Á 1. og 2. mynd sæst ein á sum kemur úr bakkanum við



4. mynd. *Lendið omanfyri vegin í Hjarðardali, har áin rennur undir heilum.*

ovara vegjaðaran og á 3. mynd sæst sjálvur áarmunnin nær við. Á 1. mynd sæst lendið oman fyri vegin har áin fyri ein stóran part rennur undir heilum. Bakkin er 6 m høgur. Áin kemur undan á mótinum millum mórenu og mógv, hon hevur her matað seg 25—30 cm niður í mórenu og 25—30 cm upp í mógvin. Mógvurin omaná er umleið 1 m tjúkkur. Í áarleguni í munnanum er gróttilfarið samankittað av jarni. Áin er komin fram í bakkanum við vegjaðarin tá vegurin varð gjørdur, frammanundan rann hon undir heilum har og kom undan aftur longri niðri, niðan fyri har vegurin nú er. Á 4. mynd sæst lendið oman fyri vegin har áin sum kemur úr bakkanum



5. mynd. *Lendið omanfyri vegin í Hjarðardali. Svørðurin smokkaður.*



6. mynd. *Lendið omanfyri vegin í Hjarðardali. Áin hevur matað seg so langt upp í mógvin at svørðurin er smokkaður.*



7. mynd. *Lendið omanfyri vegin í Hjarðardali. Á sum rennur undir heilum kemur undan aftur.*

rennur undir heilum, hon peikar móti steinunum aftan á myndini, og á 5. mynd sæst at svørðurin er skrædnaður so tað sæst niður á ánna. Hon rennur á leysum gróti, hevur matað seg niður í leguna og upp í mógvin, so langt upp at svørðurin er smokkaður. Sama fyribrigdi sæst á 6. mynd. Á 7. mynd sæst á sum rennur undir heilum har hon kemur undan aftur.

Dømini eru so mong sum kundu verið drigin fram, nevnt skal bert verða afturat eitt dømi í Havnardali við vegin inn móti ruskstøðini. Á 8. mynd sæst lendið millum vegin og hamarin omanfyri. Fremst á myndini er ein áarmunni. Áin hevur matað seg 30—40 cm niður í harða reydliga mórenu,



8. mynd. *Lendið millum vegin og hamarin í Havnardali. Fremst á myndini áarmunnin (tummastokkurin 1,20 m høgur).*

eyrur er í áarleguni. Eisini hevur hon matað einar 40 cm upp í mógvin omaná. 1,5 m inn frá áarmunnanum er áartvørmátið, sum er rundleitt, umleið 35 cm høgt.

Fylgja vit ánni niðaneftir, niðan undir hamarin, so væl sum til ber, rennur hon við hvørt undir heilum, við hvørt opin og við hvørt sæst niður á hana har svørðurin er skrædnaður. Hon greinar seg og tekur saman aftur so ikki er altíð líka lætt at siga um tað er sama áin og sum frammanundan nevnt er stundum torført at siga hvat er upprunaligt og hvat er órógvað av mannahond. Beint undir hamarinum er bratt og vatnræsini



9. mynd. *Lendið beint undir hamarinum í Havnardali.*

renna opin, men á vøllinum frammanfyri rennur undir heilum (9. mynd).

Einki óvanligt er at síggja at vatn ymsastaðni seyrar út millum mógv og mórenu ella millum mógv og hellu, men tað sum nomið hevur verið við í hesum lítla greinarstubba viðvíkur bara teimum vælavmarkaðu áarlegunum hvørs uppruni má haldast vera yngri enn seinasta glersetingin men eldri enn fyrsta mógerðin.

SUMMARY

The author describes some well known underground streams from the Faroe Islands running along the boundary plane between till and peat. He points out that the origin of the stream bed must be lateglacial-preboreal, the stream has eroded its bed down into the till and up into the overlying peat. Fig 1, 2, 3 show a section through one of these streams at the roadside near Oyndarfjørður, Fig 4, 5, 6, 7 the ground above the same stream. In Fig 5 and 6 the overlying peat roof has collapsed.